# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-USA misbrúkar sína hermegi og ger, sum tí lystir. Men USA er farið um mark (Vladimir Putin).*

# Næstan sum undir Kalda krígnum



*Ein avgjørdur Vladimir Putin skeitir eftir amerikanska verjumálaráðharranum, Robert Gates, á ráðstevnuni í Munchen.*

**Russiski forsetin, Vladirmir Putin, legði alla diplomatiska siðvenju til viks, tá hann kom við sjáldsama hvassorðaðum atfinningum at USA.**

Tey fýra amerikonsku umboðini á trygdarráðstevnuni í München hugdu upp á hvør annan, tá russiski forsetin, Vladimir Putin, segði sína hugsan um uttanríkispolitikkin hjá amerikonsku stjórnini.

-Eftir amerikonsku áskoðanini skal heimurin bara hava eitt stórveldi, sum brúkar sína megi til at trýsta onnur til at gera og halda, sum tað vil sjálvt. Hetta hevur einki við demokrati at gera. Demokrati er, at áskoðanin hjá meirilutanum verður sett upp ímóti áskoðanini hjá minnilutanum. Fólk royna at læra okkum um demokrati, men tey, sum royna at læra okkum, vilja ikki læra sjálvi, segði Putin.

Hann segði, at USA er ferð eftir ferð farið út um sítt egna mark, og at tað hevur havt vanlukkuligar avleiðingar. Hann nevndi ikki nakað dømi, men tey flestu á ráðstevnuni vistu, at tað var innrásin í Irak, sum hann sipaði til.

Russiski forsetin segði, at amerikanska framferðin at taka ymisk mál í egnar hendur hevur gjørt heimin meiri vandamiklan og ótryggan, og tað er vandamikið, tá lond brúka egna megi uttan stuðul frá ST-trygdarráðnum.

-Eingin kennir seg tryggan longur, tí Fólkarætturin er skúgvaður til viks. Vit eru vitni til, at eitt land, USA, brúkar sína hermegi í altjóða viðurskiftum. Hetta elvir til ótryggleika kring heimin og noyðir lond at útvega sær kjarnorkuvápn. USA er farið um øll altjóða mørk, segði Vladimir Putin.

## Tiknir á bóli

Sjónvarpsmyndirnar úr München vístu týðiliga, at tað hvassa orðalagið hjá russiska forsetanum kom óvart á amerikonsku umboðini, sum sótu í fremstu røð. Robert Gates, verjumálaráðharri, og senatorarnir John McCain og Joseph Lieberman vórðu sjónliga tiknir á bóli. Teir hugdu upp á hvør annan, og onkur teirra risti við høvdinum.

Robert Gates, valdi ikki at fara í mótálop, tá hann í gjár gjørdi viðmerkingar til orðalagið hjá russiska forsetanum.

-Vit hava havt eitt Kalt kríggj, og tað var nóg mikið, segði hann.

Robert Gates er fyrrverandi CIA-maður og Vladimir Putin fyrrverandi KGB-maður, og hetta brúkti Gates, tá hann í gjár gjørdi viðmerkingar til røðuna hjá russiska forsetanum.

-Gamlir njósnarar plaga at siga tað, sum liggur fremst á tunguni, segði hann og sipaði til fortíðina hjá sær og Putin. Hann legði afturat, at hann er boðin til Russlands at vitja, og at USA fer framhaldandi at samstarva við Russland í øllum felags avbjóðingum.



*Robert Gates, John McCain og Joseph Lieberman lurta eftir Puitn. Týski kanslarin, Angela Merkel, tykist ikki geva orðunum stórvegis ans.*

# Nógv rúsevni

Um vikuskiftið legði løgreglan í Turkalandi hald á 565 kilo av heroini, sum smuglarar ætlaðu sær at flyta til Niðurlond. Har hevði rúsevnið helst verið selt fyri einar 270 mió. krónur. Tað vóru servandir hundar hjá løgregluni, sum funnu rúsevnið í einum lastbili, sum bleiv kannaður á markinum millum Bulgaria og Turkaland. Fyribils eru 12 fólk tikin. Hetta er størsti einstaki rúsevnisfongurin hjá turkisku løgregluni nakrantíð, men myndugleikarnir hava leingi vitað, at nógv rúrevni verður smuglað úr Afghanistan ígjøgnum Turkaland til Evropa.

# Rýma úr New Orleans

Áðrenn ódnin Katrina herjaði New Orleans fyri hálvum øðrum ári síðani, búðu 455.000 fólk í býnum, men í dag er fólkatalið bara umleið 300.000. Orsøkin er, at mong, sum flýddu undan ódnini, eru ongantíð komin heimaftur, men samstundis vísir tað seg, at mong velja at flyta úr býnum. Tíðindastovan AP slrivar, at harðskapurin er vaksin nógv síðani ódnina, og at tað fær fleiri at rýma haðani. Harafturat gongur tað sera striltið at endurbyggja tað, sum fór í ódnini. Mong hava tí mist mótið og velja heldur at flyta úr býnum. Ray Nagin, borgarstjóri, hevur sagt, at tað fer at taka næstan 10 ár at endurbyggja New Orleans, men tað eru ikki øll, sum hava tíð at bíða so leingi, skrivar AP.

# Bispur savnar knívar

Erkabiskupurin í italska býnum Napoli hevur tikið eitt sjáldsamt stig. Í einari roynd at steðga harðskapinum í býnum er hann farin undir at savna knívar, og í kirkjunum er ein serlig kurv, sum fólk kunnu leggja sínar knívar í. Napoli er ein av háborgunum hjá italsku mafiuni, og síðani á nýggjárinum hava 13 morð verið í býnum. Stjórnin í Rom hevur boðað frá, at hon fer at seta serlig tiltøk í verk í Napoli.